ítróttur

Nr. 4 • mikudagur • 8. januar 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

Framtíðin hjá Toda:

# Avgerð fellur mánadagin

*Enn er ógreitt hvar Todi Jónsson fer at spæla fótbólt komandi kappingarár. Sáttmálin rennur út í summar, og enn er eingin nýggjur sáttmáli undirskrivaður. Mánadagin fæst væntandi greiða á spurninginum, tá nýggjur fundur verður ímillum partarnar*

*Mynd: Álvur Haraldsen*



**Fundur var síðsta mánadag millum FCK og Toda Jónsson um nýggjan sáttmála millum partarnar, men enn er einki endaligt komið uppá pláss. Nýggjur fundur er ásettur komandi mánadag, tá endalig avgerð væntandi fellur viðvíkjandi framtíðini hjá Toda**

FÓTBÓLTUR
*Stefan í Skorini*

Komandi mánadag verður endiliga greitt, um Todi Jónsson fer at halda fram í FCK, ella um hann fer at finna sær eitt annað felag.

Fundur var millum ítróttarstjóran í felagnum, Niels Christian Holmstrøm, og Toda Jónsson mánadagin. Tá varð avtalað, at partarnir skulu møtast aftur komandi mánadag, og tá fellur væntandi ein endalig avgerð viðvíkjandi fótbóltsframtíðini hjá fremsta føroyska leikaranum.



*Tað er Niels Christian Holmstrøm, ítróttarstjóri í FCK, sum vegna felagið førir samráðingarnar við Toda Jónsson. Higartil hevur felagið ikki viljað gingið teimum fíggjarligu krøvunum hjá føroyska leikaranum á møti*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

– Eg havi fingið tað síðsta útspælið uppá ein sáttmála frá FCK, og tað fari eg at meta um komandi dagarnar, sigur Todi Jónsson við danskar fjølmiðlar á internetinum.

Sáttmálaskeiðið hjá Toda Jónssyni við FCK rennur nevniliga út í summar, og leikarin kundi longu frá 1. januar fara undir samráðingar við onnur feløg uttan loyvi frá leiðsluni í FCK.

### Ganga ikki krøvunum á møti

Tað er eingin loyna, at onnur feløg hava áhuga fyri at fáa Toda Jónsson í teirra hóp, og eitt nú Poul Hansen, venjari í AGF, hevur alment givið sítt ynski til kennar um at fáa einasta føroyingin í Superliguni til felagið.

Tann størsti knúturin í samráðingunum hevur tó verið tann fíggjarligi parturin, har FCK ikki hevur viljað gingið krøvunum hjá Toda á møti. Síðsti fundurin var tann 12. desember, tá FCK ikki vildi hoyra talan um tey fíggjarligu krøvini.

Todi hevur eisini gjørt greitt, at hann ikki hevur verið nøgdur við sín leiklut í FCK í fyrru hálvu av kappingarárinum. Tá hevur hann ofta sitið á beinkinum, meðan Peter Møller, Sibusiso Zuma og Jörgen Pettersen hava verið valdir framum hann.

Tað er helst eisini ein av orsøkunum til, at Todi hevur verið heldur trekur at skriva undir nýggjan sáttmála. Partarnir hava havt fleiri fundir í heyst og uppundir jól, men enn er einki ítøkiligt komið burturúr.

Um Todi Jónsson ikki velur at skriva undir við FCK og fer at leita eftir nýggjum felag, skal hann ikki vænta at fáa tað stóra av spælitíð í seinnu hálvu av kappingini. Venjarin í FCK Hans Backe hevur nevniliga gjørt greitt, at hetta fer at fáa avleiðingar, og at aðrir leikarar, sum hava longri tíðarskeið eftir av sáttmálanum, verða tiknir framum, tá liðið skal setast.

Tað hevur annars gingið avbera væl hjá føroyingin-um í FCK seinastu tíðina. Hann hevur skotið fimm mál í landskappingini umframt nøkur mál í steypakappingini og í UEFA Cup, har teir tó máttu lúta fyri svenska felagnum Djurgården.

Tað eydnaðist okkum tíverri ikki at fáa viðmerkingar frá høvuðspersóninum sjálvum til dagsins blað.





*Broytingarnar koma at merkja eina meirútreiðslu hjá nótaskipunum.*

# Dýrari hjá nótaskipunum



*- Fá prosentir vórðu flutt undir samráðingunum, sigur formaðurin í Føroya Reiðarafelag, Jákup Sólstein*

**– Broytingarnar koma at merkja eina meirútreiðslu hjá einum nótaskipi sum Tróndi í Gøtu uppá einar 250.000 krónur um árið, sigur Jákup Sólstein**

SEMJA
*Vilmund Jacobsen*

Formaðurin í Føroya Reiðarafelag, Jákup Sólstein, sigur, at felagið í fyrstu syfti avvísti øllum krøvum hjá Føroya Skipara-og Navigatørfelag um at hækka yvirmannapartarnar, men tá ið FSN at enda hongdi seg í partin hjá 2. stýrimanni umborð á nótaskipunum - og slepti øðrum krøvum um hækkingar annars, gav felagið eftir og vildi undirskriva ein nýggjan sáttmála.

### Sáttmálarnir eins

– Vit dugdu ikki at síggja, at vit komu nógv longur, sigur Jákup og vísir á, at hækkingin hjá 2. stýrimanni við teimum smærru nótabátunum hevur ikki so stóran prinsipiellan týdning, tí hesi skip gerast færri og færri í tali.

Jákup Sólstein sigur, at Føroya Skipara-og Navigatørfelag sum heild vildi hava yvirmannapartarnar hækkaðar, men hesum avvísti reiðarafelagið.

– Vit høvdu sersáttmálar um nótaskip, sum vóru uppsagdir, og hesir skuldu eisini fáast uppá pláss. Nú eru sáttmálarnir hjá yvirmonnum við teimum stóru nótaskipunum eins, og tað kann gerast ein fyrimunur, tá ið sáttmálasamráðingar verða aftur.

Hann vísir á, at broytingarnar koma at merkja eina meirútreiðslu hjá einum nótaskipi sum Tróndi í Gøtu uppá einar 250.000 krónur um árið.

Ein onnur broyting, sum feløgini samdust um, var eitt ískoyti til sáttmálan hjá frystitrolarum, sum heilfrysta umborð. Her er komið at standa aftrat, at sáttmálin eisini fevnir um skip sum kryvja, avhøvda ella skráskera fiskin umborð. Talan er her um skip, sum fiska í Irmingarhavinum og skip sum heilfrysta fiskin.

### Lítil lækking

Jákup Sólstein vísir á, at nýggi sáttmálin eisini ber í sær, at partarnir hjá skipara og stýrimanni umborð á stállínuskipum lækka eitt lítið sindur.

– Annars eru eingir partar og eingi prosent broytt nakrastaðni í sáttmálanum, leggur hann dent á.

Nýggi sáttmálin áleggur eisini reiðarunum at rinda fyri kravd skeið hjá skiparum og navigatørum, men einastu skeiðini, sum eru nevnd í hesum sambandi, eru trygdarskeið og brandskeið.

– Men her skulu vit so rinda fyri kravd skeið.

Jákup Sólstein vísir á, at hesi viðurskifti hevur reiðarafelagið havt í sáttmálanum við maskinmeistararnar seinastu fýra árini.